# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM
# 18. MAI 2015

# ÁRSFRÁGREIÐING 2014

Faroese Fish Farmers · Smærugøta 9A · P.O. Box 1038 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 30 99 00 · www.industry.fo

## Frágreiðing frá nevndini

*Framleiðsla og søla*

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í fjør góð 70.000 tons í kruvdari vekt. Framleiðslan var sostatt væl hægri enn í 2013, tá havbúnaðurin framleiddi góð 62.000 tons. Framleiðslan vaks við hesum 12%. Søluvirðið øktist úr 2,4 mia. kr. í 2013 upp í góðar 2,9 mia. kr. í 2014, og stendur føroyska alivinnan nú næstan fyri helvtini av samlaða føroyska vøruútflutninginum. Føroyska alivinnan marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin sum føroyskur laksur fær á marknaðinum er eisini hægri pr. kg í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum. Seinastu árini er alsamt størri parturin av føroyska laksinum seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, eitt nú Rusland, USA og Kina. Í 2004 varð 90% av laksinum útfluttur til ES, í 2009 var hetta minkað til 69%, og í 2014 vórðu 41% útflutt til ES. Eftir 10 árum er marknaðarparturin til ES sostatt minkaður við meira enn einari helvt, og tað er eisini serliga uttanfyri Evropa, at vøksturin í søluni er eyðsýndur í hesum tíðum.

Karmarnir kring alivinnuna eru sum heild góðir, og vinnan hevur seinastu árini havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, fóðurfaktori, sjúkustøðu og framleiðslukostnaði. Fellið er eisini á einum lágum støði, men hevur tó verið hækkandi seinastu árini. Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur ein høgur laksaprísur eisini havt við sær, at feløgini hava havt góð fíggjarlig úrslit í 2014. Góðu fíggjarligu úrslitini hava eisini haft við sær, at alivinnan hevur møguleika at gera íløgur í framleiðslutólini. M.a. verða íløgur gjørdar í útbygging av smoltstøðunum, nýggjum brunnbátum o.a. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan, og at geva møguleikar fyri at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt.

*Lívfrøðiligir váðar*

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er í laksaframleiðslu kring allan heimin, og eigur trupulleikin at verða tikin í størsta álvara. Feløgini hava gjørt avtalur um felags avlúsingar, sum innibera, at feløgini avlúsa samstundis og býta vitan og úrslit sínamillum. Ein grundleggjandi fortreyt fyri framtíðar felags avlúsingum er, at eisini onnur munadygg felags tiltøk verða framd. Fyri at minka um tørvin á avlúsingum, eru feløgini farin undir at nýta rognkelsi at halda lúsatalinum niðri. Í 2014 vórðu tey fyrstu rognkelsini sett út í føroyskar aliringar,

og væntað verður, at fleiri royndir við rognkelsum verða gjørdar í ár. Tað er ov tíðliga at siga við vissu, hvørja ávirkan rognkelsini fara at hava á lúsatalið, men royndirnar higartil hava verið góðar. Eisini onnur tøkni verður roynd fyri at minka um tørvin á avlúsingum.

*Marknaðarútlit*

Globala framleiðslan av laksi øktist við uml. 8% í 2014, men hóast hetta helt prísurin sær. Globala framleiðslan av laksi veksur í ár væntandi uml. 5% í mun til í fjør. Samstundis veksur eftirspurningurin á nýggjum marknaðum skjótt, og vøkstur er eisini á siðbunda evropeiska marknaðinum. Marknaðarútlitini eru tískil góð, og prísurin á laksi verður væntandi lutfalsliga góður í 2015. Laksaprísurin hevur tó søguliga sæð sveiggjað nógv, og tí kunnu koma tíðarskeið, tá tað kann gerast torført at vinna pening á marknaðinum.

Í 2014 vórðu umleið 14,7 mió. smolt sett út í Føroyum. Hetta er væl meira enn í 2013, tá umleið 13,7 mió. smolt vórðu sett út. Í 2015 minkar samlaða framleiðslan av laksi frá føroyskum havbúnaði væntandi nakað (uml. 3-5%), m.a. orsakað av náttúrligu sveiggjunum í framleiðsluni.

Samanumtikið var 2014 enn eitt søguligt ár fyri føroyska alivinnu, tí ongantíð áður hevur tøkan verið so stór og søluvirðið av føroyskum laksi verið so høgt, sum tað var í fjør.

*Skattur og avgjøld*

Í 2014 varð nýggj skipan um loyvisskatt fyri alifyritøkur sett í verk, sum í stuttum snýr seg um, at fyritøkurnar umframt vanliga partafelagsskattin skulu gjalda eitt tøkugjald á 0,5% av marknaðarvirðinum av tøkuni umframt 4,5% eykaskatt av yvirskotinum. Lógin varð grundað á tilmæli frá arbeiðsbólki, har Havbúnaðarfelagið eisini luttók í arbeiðinum. Fyri at fáa støðugar karmar fyri virksemið í komandi árum, tók felagið undir við tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum, treytað av, at einkarrætturin hjá apotekinum varð avtikin.

Hóast avgjaldsskipanin bert er eitt ár gomul, hava røddir í seinastuni verið frammi um einaferð enn at broyta avgjaldsskipanina, sum semja varð um at seta í verk í fjør. Í

hesum sambandi er vert at viðmerkja, at samanborið við onnur lond, sum føroyskur havbúnaður kappast ímóti, so eru samlaðu skattasatsirnir í Føroyum teir hægstu. Trúvirðið hjá Føroyum sum íløguland er í vanda, um vit nú enn einaferð ætla at leggja meira skatt og avgjøld á vinnuna. Gongdin í londunum uttanum okkum er, at skattur og avgjøld verða lækkaði, so kappingarførið verður enn betur, og tey kunnu tiltrekkja meira kapital og tessvegna skapa enn betur grundarlag fyri vaksandi vinnuligum virksemi. Føroyskur havbúnaður fær ongan almennan stuðul.

Ongantíð áður hevur føroysk vinna goldið so nógv í skatti sum nú. Føroysk vinna hevur heldur ongantíð gjørt so stórar íløgur í vinnulig rakstrartól sum nú, og er hetta við til at skapa enn meira virksemi og arbeiðspláss. Tað er umráðandi, at støðugir karmar verja um hetta økjandi vinnuliga virksemið, soleiðis at vinnan í føroyska samfelagnum betrar um kappingarførið mótvegis teim hon kappast ímóti.

# Innihaldsyvirlit

1. ENDAMÁL HAVBÚNAÐARFELAGSINS ........ 7

2. ALMENT UM GONGDINA Í ALIVINNUNI ........ 8

2.1 FRAMLEIÐSLA ........ 9

2.2 ÚTSETING AV SMOLTI ........ 10

2.3 ÚTFLUTNINGUR ........ 11

2.4 PRÍSIR ........ 12

2.5 BÝTIÐ AV ÚTFLUTNINGI ........ 14

2.6 BÝTIÐ SEINASTU ÁRINI ........ 14

3. MÁL FELAGIÐ HEVUR ARBEITT VIÐ Í ÁRINUM ........ 16

3.1 LOYVISGJALD ........ 16

3.2 APOTEKIÐ ........ 16

3.3 ROGNKELSI ........ 17

3.4 ALIRÁÐSTEVNAN ........ 17

3.5 TRÝSTTANGIN ........ 18

3.6 ISFA OG FEAP ........ 18

3.7. SALMON FROM THE FAROES ........ 18

4. LÓGIR OG KUNNGERÐIR ........ 20

4.1 LØGTINGSLÓG UM LOYVISGJALD Á ALIVINNU ........ 20

4.2 UPPSKOT UM BROYTINGAR Í LOÐSLÓGINI ........ 21

4.3 BROYTINGAR Í VÁPNALÓGINI ........ 21

4.4 BROYTINGAR Í LÚSAKUNNGERÐINI ........ 21

## 1. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá føroyskum havbúnaði - bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av alivinnuni.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:
Atli Gregersen, Luna
Egill Steintórsson, Faroe Farming
Hans Jákup Mikkelsen, Marine Harvest
Regin Jacobsen, Bakkafrost

Varalimur:
Odd Eliasen, Havsbrún

## 2. Alment um gongdina í alivinnuni

Gongdin í havbúnaðinum í Føroyum er framvegis góð, og fíggjarligu úrslitini seinastu árini hava verið góð. Karmarnir kring alivinnuna eru sum heild góðir, hóast vinna og myndugleikar áhaldandi mugu hava eyguni opin fyri møguligum broytingum, ið kunnu gerast til tað betra. Tað er av alstórum týdningi, at alivinnan framhaldandi leggur dent á skynsaman rakstur við neyvari framleiðslustýring.

Føroyska alivinnan hevur seinastu árini kunnað víst á nøkur av heimsins bestu úrslitum viðvíkjandi vøkstri, fóðurfaktori, framleiðslukostnaði og prísi. Fellið hevur eisini verið sera lágt, hóast tað hevur verið hækkandi seinastu árini. Samanborið við aðrar havbúnaðartjóðir hevur føroyskur havbúnaður sera góð úrslit at vísa á, og tað er eisini grundarlagið undir teimum góðu úrslitunum seinastu árini. Tryggir og støðugir karmar umframt nærlagni og dugnasemi í framleiðsluni hava haft við sær, at føroyski havbúnaðurin í dag bæði er lívfrøðiliga og búskaparliga burðardyggur.

Síðan 2006 er framleiðslan av alifiski økt støðugt ár um ár – 2010 undantikið. Framleiðslan í 2014 var góð 70.000 tons í kruvdari vekt, ein øking í mun til tey gott 62.000 tonsini, sum vórðu framleidd í 2013. Í 2015 væntast samlaða framleiðslan at minka nakað, so hon verður eini 67.000-69.000 tons í kruvdari vekt. Samlaða framleiðslan er tó tengd at, hvussu væl fiskurin veksur, og tí er torført at siga við vissu hvussu stór samlaða framleiðslan verður í ár.

Søluvirðið í 2014 var góðar 2,9 mia. kr. samanborið við 2,4 mia. kr. í 2013. Samanumtikið hevur 2014 verið eitt gott ár við støðugari framleiðslu og høgum miðalprísi.

Í 2015 verður mett, at útboðið av aldum laksi á heimsmarknaðinum økist við umleið 5 prosentum, í mun til ein vøkstur á 8 prosent í 2014. Laksaframleiðslan verður tá á leið 2,2 mió. tons í 2015. Orsøkin er, at lítil vøkstur er væntandi í Noregi, Stóra Bretlandi, Írlandi og Canada. Um eftirspurningurin heldur sær, eru tí útlit til, at prísurin fer at halda sær á einum rímuliga høgum støði.

Miðalprísurin á feskum føroyskum laksi var í 2012 góðar 28 kr/kg, men er so øktur aftur til knappar 41 kr. kg í 2013 og prísurin er so aftur kvinkaður eitt vet uppeftir í 2014, tá miðalprísurin var góðar 41 kr/kg. Orsøkin til prísgongdina er helst, at vøksturin í útboðnum

á heimsmarknaðinum steðgaði í 2013, og at útboðið ikki hevur vaksið skjótari enn eftirspurningin í 2014.

Alivinnan er von við stór sveiggj, og prísfallið í 2011 og 2012 var væntandi. Søgan sigur, at prísurin sveiggjar nógv, men um føroyskir alarar framhaldandi hava ein burðardyggan rakstur og megna at fyribyrgja sjúku, kann alivinnan liva við teimum príssveiggjum, ið raka vinnuna.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði, verður mett, at alivinnan hevur karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnir framhaldandi arbeiða við at betra hesar karmar.

## 2.1 Framleiðsla

Tøkan í 2014 var 86.489 tons í livandi vekt, og hetta er væl meira enn í 2013. Eingi síl vórðu tikin í 2014, hetta er sama støða sum í 2011-12. Nøkur fá síl vóru tikin í 2013, men talan var um sera smáar nøgdir. Mynd 1 vísir, at framleiðslan í alivinnuni øktist munandi frá 2000 til 2003 og minkaði síðan tey næstu árini fram til 2006 orsakað av ILA. Í 2008 og 2009 var tøkan komin uppaftur á sama støði sum í 2003. Nøgdin minkaði aftur nakað í 2010, men er síðani økt aftur uppá núverandi støði. Tað er ongantíð fyrr tikin so nógvur fiskur sum í 2014.

**Mynd 1. Tøka av alifiski 2000-2014 (rund vekt)**




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 1,315 | 3,126 | 11,149 | 10,220 | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 |
| Laks | 33,508 | 46,014 | 44,953 | 52,526 | 40,985 | 18,962 | 13,083 | 22,305 | 38,851 | 51,500 | 45,410 | 60,497 | 76,803 | 75,852 | 86,489 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik.

Mynd 2 vísir tøkuna av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku í 2014. Her sæst, hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið. Vanliga gongdin er, at størstu nøgdirnar verða tiknar um heystið, og so hevur eisini verið í 2014.

**Mynd 2. Tøka av alifiski viku fyri viku í 2014**




Kelda: Havbúnaðarfelagið

## 2.2 Útseting av smolti

Mynd 3 vísir útseting av laksi og sílum seinastu 20 árini. Myndin vísir, at útsetingin av smolti er vaksin støðugt frá 2004 til 2010, men síðani hevur útsetingin sveiggjað nakað millum 12 og 15 mió. smolt. Útsetingin í 2014 var umleið 14,7 mió. smolt, og tað er ein vøkstur uppá 1 mió smolt í mun til 2013. Vert er at leggja til merkis, at útsetingin framvegis er munandi lægri, enn hon var árini eftir aldarskiftið, og at munandi meira fæst burturúr tí, sum nú verður sett út.

Talið av sílum, sum eru sett út, er støðugt minkað. Í 2007 vóru omanfyri tvær mió. síl sett út, men síðan er talið støðugt minkað, og síðan 2010 eru eingi síl sett út.

**Mynd 3. Útseting av smolti frá 1995 til 2014**




| | ´95 | ´96 | ´97 | ´98 | ´99 | ´00 | ´01 | ´02 | ´03 | ´04 | ´05 | ´06 | ´07 | ´08 | ´09 | ´10 | '11 | ´12 | ´13 | 14 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| mill stk | 8,3 | 7,6 | 9,6 | 13,3 | 15,5 | 19,2 | 20,8 | 20,7 | 8,7 | 2,9 | 4,7 | 9,2 | 9,5 | 8,7 | 11,2 | 14,5 | 12,1 | 15,0 | 13,7 | 14,7 |

Kelda: Rúni Dam, Sp/f Avrik

## 2.3 Útflutningur

Mynd 4 vísir, at útflutningsvirðið á alifiski er økt á hvørjum ár síðani 2006. Útflutningsvirðið av alifiski var í 2014 góðar 2,9 mia. kr. og so stórt hevur útflutningsvirðið frá føroyskum havbúnaði ongantíð verið áður. Í roynd og veru er bara talan um útflutning av laksi, tí útflutningurin av sílum er minkaður niður í einki. Laksur er í dag størsta einstaka útflutningsvøra hjá Føroyum og stendur nú fyri næstan helvtini av vøruútflutninginum hjá Føroyum.

**Mynd 4. Útflutningsvirðið av alifiski frá 2003 til 2014 (1000 kr.)**




Kelda: Hagstova Føroya

## 2.4 Prísir

Marknaðarprísurin á feskum laksi hevur hildið sær á einum høgum støði í 2014. Miðalprísurin fyri árið var góðar 41 kr. pr. kilo, og hetta er ein lítil vøkstur í mun til 2013, tá kiloprísurin var knappar 41 krónur. Marknaðarprísurin hevur sjálvsagt stóra ávirkan á úrslitið hjá alifeløgunum, og prísurin hevur søguliga sveiggjað nógv.

Mynd 5 vísir ein ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1994 til 2014. Sum myndin vísir, eru nakrir prístindar og nakrar prísgjáir.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini eru sjálvandi nógv tengd at gongdini í samlaðu framleiðsluni í heiminum. Metingar siga, at heimsframleiðslan fer at økjast við uml. 5% í ár, samstundis sum eftirspurningurin veksur, og tí eru góð útlit fyri at laksaprísurin heldur sær á einum høgum støði aftur í 2015.

**Mynd 5. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi. FOB Føroyar**




| | ´94 | ´95 | ´96 | ´97 | ´98 | ´99 | ´00 | ´01 | ´02 | ´03 | ´04 | ´05 | ´06 | ´07 | ´08 | ´09 | ´10 | ´11 | ´12 | ´13 | ´14 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prísur | 29 | 29 | 23 | 23 | 21 | 24 | 28 | 20 | 19 | 16 | 18 | 22 | 30 | 25 | 24 | 28 | 37 | 31 | 28 | 41 | 41 |

Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 6 vísir miðalprísin á frystum laksaportiónum frá 2003, tá framleiðslan veruliga tók dik á seg. Í fjør fekst hægsti miðalprísur nakrantíð fyri laksaportiónirnar, tá miðalprísurin kom upp á góðar 79 kr/kg. Prísurin á laksaportiónum er sum heild meira støðugur enn prísurin á feskum laksi.

**Mynd 6. Miðalprísur pr. kg. av frystum laksaportiónum 2003-2014.**




Kelda: Hagstova Føroya

## 2.5 Býtið av útflutningi

Mynd 7 vísir býtið av útflutninginum í virði frá 2004 til 2014. Nógv tann størsti parturin er framvegis heilur feskur laksur, sum í fjør hevði eitt útflutningsvirði uppá 2,0 mia. kr. Síðan 2006 eru laksaportiónir tó vorðnar ein alsamt størri partur av útflutninginum, og tað hevur økt um útflutningin av frystum flaki. Útflutningsvirðið á frystum flaki var í 2014 uml. 850 mió. kr., sum er tað mesta nakrantíð. Nakað verður eisini útflutt av heilum frystum laksi.

Mynd 7 vísir eisini, hvussu samlaða útflutningsvirðið er økt munandi seinastu árini, og í fjør var aftur ein stórur vøkstur í samlaða útflutningsvirðinum av aldum fiski uppá umleið ein fimting samanborið við árið fyri. Uppá 10 ár er útflutningsvirðið frá alivinnuni økt úr 500 mió. kr. uppí góðar 2,9 mia. kr. í 2014.

**Mynd 7. Býtið av útflutningi 2004-2014**




Kelda: Hagstova Føroya

## 2.6 Býtið seinastu árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit yvir útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Legg til merkis, at fráskurðir o.a. ikki er tikið við í hesa uppgerðina. Tølini eru fyri seinastu tíggju árini.

Talva 1. Útflutningsvirðið fyri ymsu vørurnar frá 2005 til 2014, í 1.000 kr.

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 206.522 | 134.650 | 254.581 | 547.364 | 795.934 | 803.161 | 1.113.741 | 1.282.705 | 1.720.921 | 1.970.142 |
| Frystur laksur | 53.660 | 32.573 | 55.274 | 40.826 | 68.587 | 69.508 | 26.508 | 40.018 | 45.235 | 23.257 |
| Laksaportiónir | 169.967 | 195.024 | 171.806 | 213.274 | 303.505 | 423.931 | 428.702 | 447.138 | 618.848 | 852.652 |
| Laksur, annað | 9.703 | 12.074 | 11.000 | 22.956 | 34.703 | 41.456 | 48.332 | 51.599 | 71.406 | 103.545 |
| Fesk síl | 484 | 34.657 | 14.043 | 13.814 | 48.320 | 43.865 | 1.356 | 0 | 418 | 0 |
| Fryst síl | 58.190 | 64.034 | 86.730 | 124.731 | 123.149 | 24.851 | 7.368 | 0 | 1.981 | 273 |
| Síl, annað | 0 | 168 | 0 | 73 | 3.613 | 1.238 | 0 | 0 | 186 | 0 |
| **Útflutningsvirði tils.** | 498.526 | 473.178 | 593.434 | 963.038 | 1.377.809 | 1.408.009 | 1.626.007 | 1.821.459 | 2.458.994 | 2.949.869 |

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar frá 2005 til 2014, í 1000 tonsum

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 9.330 | 4.514 | 10.347 | 22.681 | 28.489 | 21.541 | 35.549 | 45.067 | 42.312,10 | 47.564,90 |
| Frystur laksur | 2.374 | 1.073 | 2.087 | 1.598 | 2.587 | 1.778 | 747 | 1.483 | 1.204,40 | 610,90 |
| Laksaportiónir | 3.104 | 2.849 | 2.978 | 4.194 | 5.653 | 6.339 | 5.982 | 7.633 | 9.473,10 | 10.774,90 |
| Laksur, annað | 736 | 1.131 | 1.400 | 3.280 | 3.835 | 4.037 | 3.977 | 4.881 | 5.921,90 | 7.917,80 |
| Fesk síl | 19 | 1.302 | 637 | 644 | 2.059 | 1.273 | 18 | 0 | 18,60 | 0,00 |
| Fryst síl | 2.802 | 2.302 | 3.864 | 5.598 | 4.970 | 779 | 219 | 0 | 68,50 | 15,10 |
| **Tilsamans** | **18.364** | **13.172** | **21.313** | **37.996** | **47.591** | **35.747** | **46.492** | **59.063** | **58.999** | **66.884** |

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar frá 2005 til 2014, kr.pr.kg.

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 22,13 | 29,83 | 24,60 | 24,13 | 27,94 | 37,29 | 31,33 | 28,46 | 40,67 | 41,42 |
| Frystur laksur | 22,61 | 30,36 | 26,49 | 25,55 | 26,52 | 39,09 | 35,49 | 26,99 | 37,56 | 38,07 |
| Laksaportiónir | 54,76 | 68,45 | 57,69 | 50,82 | 53,69 | 66,88 | 71,67 | 58,58 | 65,33 | 79,13 |
| Fesk síl | 25,47 | 26,62 | 22,06 | 21,45 | 23,47 | 34,45 | 74,53 | - | 22,47 | - |
| Fryst síl | 20,77 | 27,81 | 22,45 | 22,28 | 24,78 | 31,90 | 33,58 | - | 28,92 | 18,07 |

Talvurnar vísa, at bæði nøgdin og útflutningsvirðið frá vørum úr alivinnuni eru økt seinastu árini, tó við 2010 sum undantaki, tá framleiðslan minkaði.
Prísurin á feskum og frystum laksi hevur verið fallandi í 2011 og 2012, men í 2013 og 2014 hevur prísurin verið lutfalsliga høgur. Miðalprísurin á laksaportiónum hevur verið sveiggjandi seinastu árini, men í 2014 var prísurin á laksaportiónum hægri enn nakrantíð fyrr.

## 3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

Her er ein stutt frágreiðing um nøkur mál, ið nevndin hevur arbeitt við seinasta árið.

### 3.1 Loyvisgjald

Við støði í frágreiðing frá arbeiðsbólki, sum var settur at greina og gera tilmæli um loyvisskatt í alivinnuni, tilevnaði Fíggjarmálaráðið eitt lógaruppskot, sum varð lagt fyri Løgtingið og samtykt. Í stuttum viðførir samtykta lógin um eykaskatt á alivinnuna, at alivinnan umframt vanligan partafelagsskatt skal rinda ein eykaskatt uppá 4,5 prosent av yvirskotinum umframt eitt tøkugjald uppá 0,5 prosent av marknaðarvirðinum.

Ein fortreyt fyri at Havbúnaðarfelagið tók undir við tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum var, at einkarætturin hjá Apotekinum varð avtikin, so at alifeløgini í Føroyum frítt kunnu keypa heilivág og avlúsingarevni frá øðrum veitarum uttan at ein almennur stovnur liggur ímillum. Einki er hent í hesum málinum, hóast felagið hevur roynt at strongt á fyri at fáa landsstýrið at fylgja ásetingunum í samgonguskjalinum um, at hetta málið skuldi kannast.

Í sambandi við viðgerðina av fíggjarkarmunum fyri 2015 vóru røddir frammi um, at lógin um eykaskattin átti at verið broytt, so eykaskatturin hækkaði. Felagið hevur alment ávarað ímóti at bróta semjuna longu árið eftir hon er gjørd, og hevur m.a. víst á:

- At tað er ein avgerandi fortreyt fyri vøkstur og nýggj størv í føroyskum havbúnaði, at karmarnir eru stabilir, so tað ber til at planleggja fram í tíðina. Feløgini hava íløguætlanir fyri fleiri milliardir komandi árini, sum skulu fíggjast, og tí er avgerandi neyðugt, at teir karmarnir, sum tað almenna setir fyri virksemið, ikki broytast ov skjótt.
- At alivinnan, sum er, rindar einar 350 mió kr. í skatti, og at hetta tal við verandi skattaskipan fyri alivinnuna kann væntast at vaksa í komandi árum.
- At tær íløgur, sum ætlanin er at gera, gera tað møguligt at minka um lívfrøðiligu váðarnar, økju framleiðsluna og framhaldandi fáa ein meirprís í mun til kappingarneytarnar.

### 3.2 Apotekið

Havbúnaðarfelagið hevur í mong ár ynskt, at einkarætturin hjá Apotekinum verður avtikin, men enn hevur politiski myndugleikin tíverri ikki tikið hetta ynski til eftirtektar. Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu stendur, at landsstýrið skal kanna hetta málið um einkaréttin hjá Apotekinum nærri, men landsstýrið hevur ongan vilja víst at kanna málið, hóast felagið hevur strongt á.

## 3.3 Rognkelsi

Reinsifiskar hava í fleiri ár verið nýttir í royndunum at basa lús í Noregi, og royndirnar hava higartil verið so mikið góðar, at tað stendur á at framleiða tey rognkelsi, sum eru neyðug fyri at nøkta tørvin hjá norska havbúnaðinum. Tí hevur Havbúnaðarfelagið seinastu trý árini fíggjað eina royndarverkætlan um rognkelsi saman við Fiskaaling. Ætlanin er, at rognkelsi skulu kunna nýtast til at basa lúsini í Føroyum.

Verkætlanin hevur tó havt byrjanartrupulleikar orsakað av m.a. óvæntaðum og brádligum felli í royndarframleiðsluni. Seinkingarnar í royndarframleiðsluni hava skundað undir, at feløg eru byrjað at innflyta rognkelsi úr íslandi, sum eru sett út í aliringar. Tær royndirnar hava eydnast væl, tó at avbjóðingar hava verið við m.a. flutninginum úr Íslandi.

Havbúnaðarfelagið hevur tó valt at halda fram við at fíggja verkætlanina hjá Fiskaaling aftur í 2014 og 2015 við tí vón, at framleiðslan av rognkelsum rognkelsi kundi fáast at rigga. Havbúnaðarfelagið hevur í hesum sambandi sett ein stýrisbólk við umboðum frá feløgunum til at stýra verkætlanini saman við Fiskaaling.

Framleiðslan hevur í farna árið gingið betur, hóast verkætlanini er seinkað. Seinkingar eru m.a. íkomnar, tí tað hevur staðið á at fáa nóg mikið av rognafiskum at strúka. Fyrstu føroyskt framleiddu rognkelsini vóru sett út í aliringar í apríl í ár, og um framleiðslan gongur sum hon skal, væntast í alt 400 tús. rognkelsi frá Fiskaaling at vera sett út í ringarnar hjá føroyskum alifeløgum í 2015, umframt tey rognkelsi, sum verða innflutt úr Íslandi. Tað má tó undirstrikast, at talan er um eina royndarverkætlan, sum endar í 2015. Støða er enn ikki tikin til, um farast skal undir veruliga rognkelsisframleiðslu í Føroyum, og um so er, hvussu hetta skal skipast.

Íslendsku rognkelsisframleiðararnir hava sett sær fyri at økja um sína framleiðslu, og at leingja um sesongina, tá rognkelsi verða leveraði.

## 3.4 Aliráðstevnan

Havbúnaðarfelagið hevur seinastu níggju árini skipað fyri eini árligari aliráðstevnu, sum tey seinastu árini hevur verið á Hotel Føroyum. Ráðstevnan er vorðin fastur táttur í virkseminum hjá Havbúnaðarfelagnum. Ætlanin við Aliráðstevnuni er at førleikamenna starvsfólkið innan alivinnuna, og at geva starvsfólkum í vinnuni møguleikan at hittast og netverka.

Miðað verður eftir at hava eina fjølbroytta skrá, so at starvsfólkini innan alivinnuna kunnu fáa okkurt burturúr teimum fyrilestrum, ið verða hildnir. Aliráðstevnan var aftur í ár sera væl vitjað við næstan trý hundrað gestum.

Framløgurnar frá Aliráðstevnuni eru at finna á heimasíðuni hjá vinnuhúsinum www.industry.fo.

## 3.5 Trýsttangin

Á heysti 2014 var ósemja um fígging av rakstrinum til trýsttangan, sum tað almenna eigur og rekur, og vandi var fyri, at trýsttangin ikki var tøkur, um tørvur var á honum. Havbúnaðarfelagið strongdi á at fáa myndugleikarnar at finna eina loysn á málinum, tí um trýsttangin ikki er virkin, kunnu vinnukavarar ikki gera sítt arbeiði, og føroyskur havbúnaður er í stóran mun  tengdur at tænastum frá vinnukavarum.

Tíbetur fekst ein loysn á málinum, og tað tykist eisini sum ein varandi loysn er fingin á hesum.

## 3.6 ISFA og FEAP

Havbúnaðarfelagið er limur í altjóða felagsskapunum ISFA (International Salmon Farmers Association) og FEAP (The Federation of European Aquaculture Producers. Havbúnaðarfelagið luttók á aðalfundinum hjá FEAP í Kroatia í mai 2014 og á ársfundinum í Brussel í desember 2014.

## 3.7. Salmon from the Faroes

Felagið eigur og rekur heimasíðuna Salmon from the Faroe Islands (www.salmon.fo). Tað koma javnan fyrispurningar um føroyskan havbúnað gjøgnum hesa síðuna, bæði frá keyparum og frá endabrúkarum. Fyrispurningarnir kunnu í stórum býtast í tvey: Fyrispurningar um keyp av føroyskum laksi og fyrispurningar um hvussu framleiðslan er skipað. Undir hesum síðsta eru eitt nú fyrispurningar um fóður, heilivágsnýtslu, ymisk úrslit frá yvirvøkuskipanum o.s.fr. Í hesum sambandi er tað ein stórur fyrimunur fyri føroyskan havbúnað at kunna vísa á, at einki antibiotika verður nýtt, og at fóðrið verður framleitt uttan GMO.

# 4. Lógir og kunngerðir

Í 2013 vóru hesar lógir og kunngerðir, ið hava týdning fyri alivinnuna, settar í verk ella til viðgerðar.

## 4.1 Løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu

Løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu. Lógin, sum varð samtykt í fjør, snýr seg í stuttum um tvey viðurskifti:

1. **Tøkugjald:** Tey sum reka vinnuliga alivinnu rinda 0,5% av marknaðarvirðinum á tøkuni av alifiski.
2. **Loyvisskattur:** Umframt vanliga partafelagsskattin á 18% verður rindað ein eykaskattur á 4,5% av skattskyldugu inntøkuni hjá felagnum.

Lógin er grundað á frágreiðing frá arbeiðsbólki, har eisini umboð fyri Havbúnaðarfelagið luttók. Havbúnaðarfelagið ynskti at fáa støðugar karmar fyri virksemið komandi árini, og tók tí undir við tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum, treytað av, at einkarrætturin hjá Apotekinum varð strikaður.

Røddir hava í seinastuni verið frammi um at einaferð enn at broyta avgjaldsskipanina, sum semja varð um at seta í verk í fjør. Í hesum sambandi er vert at viðmerkja, at samanborið við onnur lond, sum føroyskur havbúnaður kappast ímóti, so eru samlaðu skattasatsirnir í Føroyum teir hægstu. Trúvirðið hjá Føroyum sum íløguland er í vanda, um vit nú enn einaferð ætla at leggja meira skatt og avgjøld á vinnuna. Gongdin í londunum uttanum okkum er, at skattur og avgjøld verða lækkaði, so kappingarførið verður enn betur, og tey kunnu tiltrekkja meira kapital og tessvegna skapa enn betur grundarlag fyri vaksandi vinnuligum virksemi. Føroyskur havbúnaður fær ongan almennan stuðul.

Ongantíð áður hevur føroysk vinna goldið so nógv í skatti sum nú. Føroysk vinna hevur heldur ongantíð gjørt so stórar íløgur í vinnulig rakstrartól sum nú, og er hetta við til at skapa enn meira virksemi og arbeiðspláss. Tað er umráðandi, at støðugir karmar verja um hetta økjandi vinnuliga virksemi, soleiðis at vinnan í føroyska samfelagnum betrar um kappingarførið mótvegis teim hon kappast ímóti.

## 4.2 Uppskot um broytingar í loðslógini

Havbúnaðarfelagið fekk uppskot til ummælis um broytingar í loðslógini, har ætlanin var at linka loðskravið. Havbúnaðarfelagið vísti á tað óhepna í uppskotinum og mælti frá, at tað varð samtykt.

Lógaruppskotið varð tikið aftur í mai 2015, og ætlanin er í staðin at gera broytingar í loðskunngerðini. Felagið fer at fylgja hesum arbeiði.

## 4.3 Broytingar í vápnalógini

Felagið fekk eisini uppskot um broytingar í vápnalógini til ummælis. Í felags hoyringssvari við øðrum feløgum í Vinnuhúsinum tók felagið undir við, at tað verður ein greið skipan fyri at keypa, eiga og nýta vápn. Víst varð tó á, at lógaruppskotið ikki tók hædd fyri, at tað kann vera neyðugt hjá feløgum at keypa og eiga lutir, sum eru fevndir av vápnalógini. Eisini varð tað ikki greitt, um verandi skipan við serloyvi frá Landfútanum helt fram. Hesar viðmerkingar vórðu tiknar til eftirtektar, og ásett er í samtykti lógini, at løgfrøðiligir persónar, sum í sínum virki hava serligan tørv á at nýta skotvápn, kunnu søkja um loyvi at keypa og eiga skotvápn. Tó heldur skipanin við serloyvum frá Føroya Landfúta eisini fram, so tað er framvegis neyðugt at søkja um loyvi frá Føroya Landfúta, umframt nýggja loyvið. Starvsfólk hjá fyritøkum, sum nýta lutir, sum eru fevndir av vápnalógini, skulu hava vápnaloyvi.

## 4.4 Broytingar í lúsakunngerðini

Kunngerðin um yvirvøku og tálming av lúsum á alifiski varð broytt í desember 2014. Størsta broytingin var, at um eitt alibrúk ofta hevur lúsateljingar, sum fara upp um markvirðið, nógvar lúsaviðgerðir í mun til alibrúk í Føroyum annars ella ófullfíggjaðar viðgerðir, kann landsdjóralæknin avgera, at talið av smoltum ikki skal vera hækkað í mun til seinastu útseting, ella at talið verður lækkað.